


# Tú kanst vera við til at avgera vinnaran

Fyri at atkvøða send eini sms boð til 1930, við koduni, ið stendur aftan fyri tað navnið, ið tú vilt atkvøða fyri. Hvørt sms kostar 5 kr., og tú hevur loyvi at atkvøða einaferð fyri hvørja planet. Øll føroysk fartelefonhald bæði hjá Føroya Tele og hjá Vodafone kunnu luttaka.
Tey, ið eru við í atkvøðugreiðsluni taka samstundis lut í lutakasti um fleiri góðar vinningar



## Lena Anderssen

Lena Anderssen er aftur í ár millum nøvnini, ið eru í uppskoti til heiðurin besta songkvinna. Lena hevur í ár spælt munandi fleiri konsertir her heima enn hon hevur gjørt seinnu árini, og við seinastu fløguni "Let Your Scars Dance", júst útgivnari í Danmark, er tað ikki ósannlíkt, at hon ikki í sama mun fer at vitja føroyskar pallar komandi árið. Fløgan hevur longu gingið sigursgongd her heima og vann í fjør planetina fyri bestu fløgu, eins og lesarar á Dimmu valdu hana til ársins fløgu. Røddin hjá Lenu er framúrskarandi. Hon hevur í størri mun enn nøkur onnur føroysk songkvinna lært seg at brúka sítt ljóðføri á mest áhugaverdan hátt. Hetta er fjórða árið á rað, at Lena er í uppskoti til henda heiður.



## Linda Andrews

Fáar føroyskar songkvinnur munnu hava so nógvar og góðar royndir í útlondum sum Linda Andrews - Hetta nærum uttan at føroyingar hava varnast tað. Men í ár trein hon veruliga inn aftur á føroyska tónleikapallin. Henda føroyska gospel diva gav fyrstu fløguna út sum einstalkingur og spældi eina minniliga konsert á Summarfestivalinum, ið fekk ummælarar og áskoðarar at kappast um at rósa henni. Røddin er egin og teknikkurin er í serflokki. Linda hevur nógvar royndir sum kórsangari og kórleiðari, og hesar royndir, ið telja m.a. arbeiði saman við heimsstjørnum, hava givið henni eina serstakliga góða fatan av, hvussu hon fær brúkt sína rødd á bestan hátt.



## Anna Háberg

Anna Háberg hevur við fløguni "Nakið", víst at hon telist millum bestu songrøddir í landinum. Anna Háberg megnar í ein nærum óhoyrdan mun í føroyskum høpi, at lata kenslurnar leka út gjøgnum røddina. Hetta er so inniligt sum tað blívur. Anna Háberg ferðast á hesi útgávuni innan tann lætta og afturlenaða jassin, og megnar at gera tónleikin viðkomandi og hjartaligan í ein mun, sum ger útgávuna áhugaverda fyri øll, ið dáma góðan tónleik.



## Jensina Olsen

Jensina Olsen gav í heyst sína fyrstu fløgu út undir egnum navnið. Fløgan "Eitt sindur av tí bláa" bjóðar okkum hesa frálíku songkvinnu í einum jasskendum hami, ið letur røddina koma til sín rætt.

Røddin er egin og sjarmerandi, og Jensina syngur spælandi og við nógvum yvirskoti. Hetta ger, at lurtarin illa kann annað enn hugna sær, tá Jensina syngur. Sum virkin í kórinum mpiri hevur Jensina somuleiðis verið virkin innan kórsang í ár, og hevur eisini har víst, at hon dugur at bróta við vanahugsan og gera tingini á sin egna hátt. Hetta er ein songkvinna, ið hevur musikalitetin í hvørjari spong.



## Eivør Pálsdóttir

Eivør Pálsdóttir hevur aftur í ár verið ein tann føroyska kvinnurøddin, ið er farin víðast um. Eivør hevur ferðast við sínum tónleiki eitt nú í Kanada, Danmark og Íslandi, umframt fleiri minniligar framførslur í Føroyum. Herfyri spældi Eivør kirkjukonsertir í Føroyum, ið enn einaferð staðfestu hennara støðu sum ein heilt einastandandi songkvinna. Fyrr í ár var Eivør í uppskoti til ikki færri enn fimm heiðurslønir á Danish Music Awards Folk, eins og hon var í uppskoti til heiðurslønina sum besta songkvinna í Íslandi. Men vit eiga hana, og hon verður fjórða árið á rað innstillað til heiðurin besta songkvinna í Føroyum, ein heiður, ið hon hevur vunnið tvær ferðir á Planet Awards.